# Trampolin fór á flog



Eru trampolinirnar ikki væl festar, verða tær lætt tiknar av vindi

**Tíðin er komin at taka niður ella festa trampolinurnar**

VINDUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Nú summarið er farið at halla, og heystið stendur fyri, kunnu vit vænta dagar við nógvum vindi.

Sunnunáttina var nógvur vindur, og tá fór ein trampolin Millum Gilja í Hoyvík á flog. Sløkkiliðið fekk boð um at fara út at savna leivdirnar saman.

Politiið ger vart við, at nú eiga fólk at ansa eftir trampolinunum. Antin mugu tær takast niður ella festast heilt væl.

# Hjálmurin bjargaði henni

**Ein 14 ára gomul genta á súkklu varð sunnukvøldið árend av einum bili sutt frá norðara munna á Kollafjarðartunlinum. Hevði hon ikki havt fallhjálm, hevði verri verið vorðið, sigur politiið**

FERÐSLUÓHAPP

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



Sunnukvøldið fór ein 14 ára gomul gentu á súkklu úr Havn norðureftir.

Tá ið hon var komin gjøgnum Kollafjaðartunnilin og nærkaðist busssteðgiplássinum, ætlaði hon at snara inn á stegiplássið, har vinkona hennara stóð og bíðaði.

Hon gjørdi klárt at snara til vinstru, men í tí sama varð hon árend av bilinum, ið koyrdi aftaná henni. Bilførarin hevði ikki varnast, at hon ætlaði sær yvirum og skuldi til at yvirhála hana, tá ið hann rendi á gentuna.

Gentan varð slongd upp á bilin.

Hon var tíbetur í fallhjálmi, tí høvdið tók. Slagið var so mikið hart, at hjálmurin brotnaði. Tí er tað ikki ov nógv sagt, at hjálmurin bjargaði henni, heldur politiið.

**Einki brot**

Gentan varð flutt á Landssjúkrahúsið til kanningar. Hon hevði ilt um allan kroppin, men sambært politinum hevði hon ikki brotið nakað, hevði bara ilt um allan kroppin.

Vinkona hennara var vitni til óheppið. Hon var púra skelkað, og tí noyddist fólk at taka sær av henni eisini.

Óhappið hendi beint eftir klokkan 19.30.

Politiið veit ikki, um gentan hevði ljós á súkkluni, og um hon gjørdi tekin um, at hon ætlaði sær at snara tvørtur um vegin.

Tað eru spurningar, ið svarast skulu, tá ið finnast skal útav, hvør hevði skyldina av óhappinum.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin



-har tað hendir

